umhvørvisstovan

P/F MEST
J.C SVABOSGØTA 31
POSTBOX 65
110 TÓRSHAVN

Argir hin 12. desember 2013
Málsnr.: 09/00022-39
Málsviðgeri: Lena Ziskason

# umhvørvisgóðkenning

# MEST í Tórshavn




**Virki:** MEST, Tórshavn

**Adressa:** J.C. Svabosgøta 31, 110 Tórshavn

**Matr. nr.:** 224b, 965c, 965d, 966, 967, 969g, 970r og 970r

Móttikið
18 DEC. 2013

# 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 2 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá MEST í Tórshavn, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Góðkenningin er givin til MEST í Tórshavn, sum skal lúka tær treytir, sum eru nevndar undir kap. 5. Góðkenningartreytir. Í sambandi við nevndu treytir, eru nevnd ymisk tiltøk, sum skulu útinnast av MEST, fyri at tryggja, at umhvørvið verður ávirkað so lítið sum gjørligt av virkseminum.

Virksemið, ið er knýtt at smiðju- og goymslubygninginum hjá MEST í Tórshavn, hevur verið góðkent síðan 18. des. 2002. Tað virksemið er tikið við í hesi góðkenning, og tí er umhvørvisgóðkenning, HS mál nr. 611-200200105-28, dagfest 18. des. 2002 ikki galdandi eftir at henda góðkenning er komin í gildi.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 3 Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 30. november 2012 umsókn frá MEST, Tórshavn um umhvørvisgóðkenning av virkseminum í Tórshavn.

Umsóknin og móttikna tilfarið hava verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini. Eisini hevur Umhvørvisstovan havt fund við umboð frá MEST og hevur verið og vitjað á virkinum.

Undir viðgerðini av umsóknini og í samband við at áseta treytir er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, við seinni broytingum
- Vejledning fra Miljøstyrelsen nr. 3 1991, *Overfladebehandling af skibe*
- Norðurlendsk frágreiðing frá 1995, *Reduksjon av utslipp fra skipsverft*
- BAT til minking av umhvørvisárinum – *Minking av útláti frá skipasmiðjum*
- Umhvørvisgóðkenning av smiðju- og goymslubygningi hjá P/F Tórshavnar Skipasmiðju, HS mál nr. 611-200200105-28

## 3.1 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at óljóð og útlát av dusti verður avmarkað mest møguligt,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar samsvara viðurkendum skipanum,

- at umhvørvisliga besta tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær skal minkast mest møguligt,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta evni, sum kunnu vera dálkandi, út við meira umhvørvisvinarlig evni,

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent MEST í Tórshavn og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar.

MEST viðmerkti, at teirra spillivatn verðut leitt í kommunala útleiðing, sum førir spillivatnið úr landi har vatnskiftið er gott.

Harafturat ynskti MEST at fáa eina nærri frágeiðing um treytina: *Ikki er loyvt at sproytumála ella hátrýstspula skip uttanborða, sum liggja við kai.*

Umhvørvisstovan hevur tiktið hesa viðmerking til eftirtektar og broytt orðingina til: *Ikki er loyvt at sproytumála ella hátrýstspula lodrættar útvendar skipssíðir, á skipum sum liggja við kai.*

Bæði MEST og Tórshavnar kommuna greiddi frá, at frágreiðingin um hvussu reinsiskipanin hjá MEST virkar, var ikki heilt í tráð við tað sum stóð í uppskotinum. Hetta er nú rætta.

Harafturat kundi Tórshavnar kommuna upplýsa, at reinsiskipanin hjá P/F MEST varð tikin í nýtslu 3. des. 2008.

[1] **Best Available Techniques.** Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

## 3.2 Lýsing av virkseminum

Virksemið hjá MEST í Tórshavn umfatar alt virksemið sum er á matr. nr. 224b, 965c, 965d, 966, 967, 969g, 970m og 970r í Tórshavn.




Myndin vísir hvar virksemið hjá MEST í Tórshavn

Sambært byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er økið B2 øki. Umráðispartur B2, sum er havnaøki, er m.a. lagdur til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap og til virksemi, ið hava samband við hesi.

Virksemið á MEST er ný- og umbygging eins og umvælingar og viðlíkahald av skipum, og øðrum flótnadi einsum, sum liggja við kai ella verða tikin upp á beding. Talan er um bæði stál- og timburskip, maskineindir og –lutir. Virksemið er harafturat tilevning og umvæling av stáleindum á landi og søla av evnum og tilfari.

# 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

## 4.1 Útlát til sjógv

Tá skip verða umvæld ella viðlíkahildin, verða tey tikin upp á beding ella tey liggja við kai, alt eftir hvat arbeiði skal gerast.

Útlát til sjógv kemur einamest frá vasking og spuling av skipum, sum eru á beding. Tá skip, sum eru á beding, verða hátrýstspulað dettur gomul máling, reinsievni ella annað av skipinum.

Harafturat kann olja leka úr skipi, sum er á beding.

MEST hevur eina reinsiskipan, sum virkar á tann hátt, at spillvatn, sum kemur frá skipum á beding, verður samlað upp í ein brunn sum er oman ímóti sjóvarmálanum.

Spillvatnið verður so pumpað úr uppsavningarrennuni á bedingini í ein (gylle)tanga, sum verður fluttur við traktori yvir í reinsiskipanina. Spillvatnið rennur so spakuliga úr (gylle)tanganum í eina botnfellingarrennu, haðani tað verður leitt í ein oljuútskiljara.

Frá oljuútskiljaranum fer spulivatnið ígjøgnum ein fordeilibrunn og ígjøgnum 2 ymisk sandfiltur í ein útlopsbrunn. Sandfiltrini afturhalda tungmetallir úr spulivatninum.

Tá talan er um oljudálka vatn, fer spillvatnið frá oljuútskiljaranum beinleiðis í fordeilibrunnin og í útlopsbrunninum.

Botnfallið, sum kemur í tangan, verður tikið upp og burturbeint.

Um skip, sum koma á beding eru ov long, vil aftasti partur av skipinum verða uttanfyri brunnin. Um høg flóð er, kann sjógvur koma niðan í brunnin. Oljusperra liggur altíð úti, tá skip eru á beding. Um nakað óhapp hendir, verður skimmari lagdur innanfyri sperruna, sum kann taka møguligt útlát upp so hvørt. Um nakað av botnfalli fer út, er trupult at afturhalda tí.

Spillivatn frá verkstaðnum verður leitt ígjøgnum aðra reinsiskipan við oljuskiljara og koalescensfiltri.

Eftir tað verður alt spillivatnið leitt í kommunala útleiðing. Treyt verður sett til, at MEST altíð skal tryggja, at spillivatnið verður leitt út har vatnskiftið er stórt.

Fyri at tryggja, at reinsiskipanin altíð virkar til fulnar verður treyt sett til viðlíkahald av reinsiskipanini. Harafturat skulu takast royndir av spillivatninum, hetta fyri at fylgja við um spillvatnið, sum verður leitt út er nóg væl reinsað. Um spillivatnskanningar vísa, at ein ávís nøgd av dálkandi evnum verða leidd út, kann Umhvørvisstovan krevja, at MEST ger kanningar av resipientinum. Hetta fyri at síggja, um resipienturin tolir hesa útleiðing.

Fyri at avmarka dálkingina frá einum møguligum óhappi, verður treyt sett til, at bert tann nøgdin av máling, reinsievni ella øðrum, sum skal nýtast dagliga, kann standa úti á bedingsøkinum. Restin skal standa inni á goymslu.

Um skip, sum liggja við kai og verða trýstspulað ella sproytumála á teimum útvendu lodrættu skipssíðunum, ber ikki til at samla gamla máling ella annað sum dettur av skipinum á sjógv, upp. Tí verður treyt sett til, at skip einans mugu trýstspulast, um tey eru á beding.

## 4.2 Útlát til luft

Útlát til luft frá virkseminum á MEST kann m.a. vera, dust, málingabitlar og loysingarevni frá máling og reinsievnum.

Tá skip skulu málast, verða tey antin sproytumálað ella verður málað við pensli ella rullu.

Tá tað verður málað, verða loysingarevni leidd út í luftina. Harafturat verða málingarbitlar leiddir út í luftina, tá sproytumálað verður. Útlátið frá loysingarevnum er trupult at avmarka, meðan málingabitlar, sum kunnu vera til ampa uttanfyri økið hjá MEST, kunnu avmarkast við at avbyrgja staðið, meðan sproytað verður. T.d. kann ein dúkur ella verja setast yvir staðið har sproytumálað verður.
Treyt verður sett til, at virksemið frá sproytumáling ikki viðførir ampar av málingabitlum o.ø. uttanfyri økið hjá MEST í Tórshavn.

Virksemið, ið er knýtt at smiðju- og goymslubygninginum er vanligt smiðjuarbeiði umframt goymla av maskinlutum. Í bygninginum er útsúgving og kann hetta virksemið tí hava við sær útleiðing av sveisiroyki, lukti frá loysingarevnum o.l..

Virksemið á MEST kann geva nakað av óljóði m.a. frá hátrýstspuling og í styttri tíðarbilum frá tilevning av stáltilfari. Treytir verða tí settar fyri óljóð.

## 4.3 Goymslur

Stórar nøgdir av máling, ymiskum reinsievnum o.a. eru á goymslu á MEST, og treytir verða settar til hesar goymslur fyri at forða dálking og møguleikanum fyri óhappum mest møguligt.

## 4.4 Burturkast

Frá virkseminum hjá MEST eru fleiri ymiskir bólkar av burturkasti og skal tað skiljast sambært galdandi reglum.

MEST skal hava neyðugt tal av bingjum, sum tryggjar at alt burturkast verður skilt rætt og goymt í bingjum.

Treyt verður sett til at alt burturkast verður latið góðkendum móttakara.

## 4.5 Annað

Treyt verður eisini sett til, at virkið skal hava fasta mannagongd við at kunna undirveitarar og onnur, sum arbeiða umborð á skipum, sum eru á beding, um viðkomandi treytir viðv. útláti til sjógv, óljóð o.a. sum eru settar til MEST. Hetta kann t.d. gerast við at lata øllum, sum arbeiða umborð á skipunum, avrit av umhvørvisgóðkenningini ella hava skrivligar mannagongdir fyri hvussu ávíst virksemi skal fara fram sambært treytunum.

# 5 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

## 5.1 Almennar treytir

5.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.1.2 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

5.1.3 MEST hevur ábyrgdina av øllum útlát, dálking, óljóði o.ø., sum koma frá skipum o.ø., sum eru á beding, eisini um onnur enn starvsfólk hjá MEST eru atvoldin.

5.1.4 Allar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

5.1.5 Allar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av MEST.

5.1.6 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

5.1.7 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

5.1.8 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkennignin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

5.1.9 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 5.2 Innrætting og virksemi

5.2.1 Virksemið skal rekast sambært góðkenningartreytunum og sum ávíst í móttikna tilfari.

5.2.2 Øki, sum hoyra til MEST, skulu vera týðiliga merkt og haldast rein og ruddilig.

5.2.3 Bedingsøkið og onnur arbeiðsøki, ið hoyra til virkið, bæði innandura og uttandura, har møguleiki er fyri spilli av t.d. olju, máling ella øðrum kemiskum evnnum, skulu hava fast undirlag.

5.2.4 Hølir, ið nýtt verða til goymslu av olju, máling, reinsievnum o.ø., skulu hava hóskandi tætt undirlag, soleiðis at møguligir lekar kunnu haldast aftur.

5.2.5 Har vandi er fyri spilli av máling, olju o.ø., skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 5.3 Spillivatn

5.3.1 Frárenningar á bedingsøkinum skulu føra vaskivatn í brunn, sum tryggjar at onki fer óreinsað á sjógv.

5.3.2 Alt vaskivatn, sum rennur í brunnin, skal leiðast ígjøgnum reinsiskipan, áðrenn tað verður leitt í kommunala útleiðing.

5.3.3 Møguligir lekar frá skipum skulu kunna haldast aftur, soleiðis at onki sum kann dálka, kann renna á sjógv.

5.3.4 Aftan á reinsingina og áðrenn spillivatnið verður leitt út, skal vera møguligt at taka sýni av spillivatninum.

5.3.5 Spillivatn skal leiðast í útleiðing, har rákið førir spillivatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

5.3.6 Munnin á spillivatnsútleiðingini skal í minsta lagi vera 1 metur undir størstu fjøru.

5.3.7 Reinsiskipanin skal vera undir regluligum eftirliti og reinsast og røkjast soleiðis, at hon altíð virkar til fulnar.

5.3.8 Fyri at avmarka útleiðingina mest møguligt, skal møguligt spill av olju ella øðrum takast upp og burturbeinast áðrenn undirlagið verður spulað.

5.3.9 Ikki er loyvt at sproytumála ella hátrýstspula lodrættar útvendar skipssíðir á skipum, sum liggja við kai.

5.3.10 Møguligt spillvatn frá verkstaði skal leiðast gjøgnum oljuskiljara sum tryggjar, at innihaldið av mineralskari olju í mesta lagi er 10 mg/l.

5.3.11 Nýtsla av reinsievnum skal avmarkast mest møguligt.

5.3.12 Miðast skal eftir at nýta mest umhvørvisvinaligu máling og reinsievnum.

5.3.13 Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina BAT, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt.

## 5.4 Útlát til luft

5.4.1 Tá skip á beding verða sproytumálað, skal MEST altíð tryggja, at hetta ikki viðførir ampar av málingabitlum, dust ella ørðum uttanfyri økið hjá MEST.

5.4.2 Um ampar eru av málingabitlum, dusti, lukti ella vandi kann vera fyri heilsu, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

5.4.3 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

5.4.4 Útsúgving skal vera frá øllum innanduraøkjum, har virksemið kann hava dust ella lukt við sær.

## 5.5 Burturkast

5.5.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2], og skal latast til góðkendan móttakara.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

5.5.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egna til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

5.5.3 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

5.5.4 Umhvørvisstovan kann krevja váttan frá MEST, sum vísur nøgd, slag og hvar ávíst burturkast er latið.

## 5.6 Óljóð

5.6.1 Óljóð[3] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14 | mán – frí kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22 | Allar dagar<br>kl. 22 - 07 |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð 35 dB frá virkseminum.

5.6.2 Um ampar verða av óljóði, skal MEST seta bøtandi atgerðir í verk.

5.6.3 Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

## 5.7 Umhvørvisstýring

5.7.1 MEST skal hava eina umhvørvisstýrisskipan.

5.7.2 Umhvørvisstýrisskipanin skal m.a. innihalda mannagongdir fyri stýring av virkseminum, røkt av reinsiskipanum, skráseting, dálkingaravmarkandi tiltøk,o.a..

5.7.3 MEST skal tryggja, at allir veitarar, sum arbeiða inni á økinum hjá MEST eru kunnaðir um treytirnar í hesi góðkenning.

5.7.4 MEST skal hava fasta mannagongd við at kunna undirveitarar ella onnur sum arbeiða umborð á skipum, um ávísar relevantar treytir, sum eru settar til MEST.

5.7.5 MEST skal hava niðurskrivaðar mannagongdir fyri fyribyrging av óhappum og hvat skal gerast um óhapp hendir.

5.7.6 Umhvørvisstovan skal hava avrit av umhvørvisstýrisskipanini og tilhoyrandi mannagongdum.

5.7.7 Um nøkur broyting verður gjørd í umhvørvisstýrisskipanini, skal Umhvørvisstovan kunnast um hetta.

[3] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 5.8 Sýnistøkur og kanningar

5.8.1 Seks ferðir, við áleið einum mánaða millumbili skulu takast sýni av spillivatninum, áðrenn tað verður leitt í kommunala útleiðing. Fyrstu ferð tveir mánaðir eftir at góðkenningin er komin í gildi.

5.8.2 Sýnistøkur og kanningar skulu altíð gerast meðan virksemi er á staðnum.

5.8.3 Spillivatnið skal kannast fyri:

- Olju (mineral)
- Suspendera evni
- Botnfelliligt evni
- pH-virðið
- kopar, sink, nonylfenoletoxylat og butylbenzylftalat

5.8.4 Eftir at Umhvørvisstovan hevur móttikið úrslitini frá hesum kanningum verður støða tikin til, um neyðugt er við framhaldandi kanningum og um neyðugt er at gera kanningar fyri somu evni í resipientinum.

5.8.5 Umhvørvisstovan kann krevja at MEST kannar fyri onnur evni enn ásett í 5.8.3.

5.8.6 Umhvørvisstovan kann krevja, at MEST ger kanningar av sjógvi og av botninum útfyri bedingsmunnan fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkseminum.

5.8.7 Vísa kanningarúrslitini, at upphópan av ávísum evnum fer fram, kann Umhvørvisstavn krevja, at virkið við ávísari freist ger eina ætlan fyri bøtandi tiltøkum.

## 5.9 Óhapp

5.9.1 Hendir eitt dálkingaróhapp[4], skulu beinavegin setast í verk tiltøk til avmerking og upprudding.

5.9.2 Óhapp, sum hava dálking við sær, skulu fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

## 5.10 Rakstarskráseting/Umhvørvisfrágreiðing

5.10.1 MEST skal skráseta hesar upplýsingar:

- Tal og stødd av skipum, sum hava verið á beding,
- Nøgd og slag av máling, reinsievnum o.a. pr. ár,
- Nøgd av burturkasti, tilskilað slag og hvønn tað er latið til,
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning,
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi,

5.10.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum, og skulu goymast í minasta lagi 5 ár.

5.10.3 MEST skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing, sum inniheldur omanfyri nevndu skrásetingar, saman við kanningarúrslitum. Somuleiðis skal frágreiðingin innihalda frágreiðing um gjørd og ætlað umhvørvistiltøk.

5.10.4 Umhvørvisfrágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi ári.

---

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 6 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Suni Petersen, deildarleiðari /

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Tórshavnar kommuna, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn